Páll bónda Patursson, fær turt uppá kroppin, mat og drekka at styrkja seg av og verður førdur til Havnar, har hann gevur sjóforklaring.

Síðan varð hann lagdur á sjúkrahúsið. Hann tyktist ikki at hava fingið stórvegis mein av hesi feigdarferð. Hann fór tó ikki at gerast arbeiðsførur aftur fyrsta mánaðin.

Dagin eftir vóru bátar úti og leitaðu, men einki varð funnið. Rókur, ið kom sunnanifrá, hevði tó eystanfyri Sandoynna funnið eina útlendska ár við einum trýkantaðum segli á. Menn ivaðust ikki í, at hetta var frá bjargingarbátinum á Sally.

## Lík funnið

Hósdagin eftir varð líkið av Niels Monberg frá Sally-ólukkuni funnið. Ein útróðrarbátur úr Vestmanna fann tað í Vestmannasundi millum Vestmanna og Slættanes, nærri Vágalandinum.

Ein enskur trolari sigldi líkið til Havnar. Tað varð beinanvegin í bili flutt til hospitalið, har líksýn var. Síðan varð hildin ein hátíðarlig andakt. J. Dahl próstir helt eina hjartagrípandi røðu.

Haðani varð líkið flutt heim aftur á kajuna til Tjaldur, ið føra tað skuldi til hvíldar í heimlandsins jørð.

Reiðuliga væl av fólki fylgdi, og nógv fólk var samankomið á kajuni at sýna hesum fremmanda unglingi, sum so ólukkuliga endaði dagar sínar, hin síðsta heiðurin. Kistan var skrýdd við fløggum, og undir tøgn frá mannamúgvuni varð hon hátíðarliga tikin umborð á skipið.

Kransar og blómur vóru send umborð á Tjaldur. Og tá kistan kom umborð, stóð einkjan eftir maskinmeistaran á Sally við lúkukarmin á fordekkinum við einum blómutyssi at leggja á kistuna.

Og so legði Tjaldur frá landi við einari syrgjandi einkju og líkinum av einum evnaríkum ungum manni umborð.

## Var tað forsvarligt at senda Sally til Føroya

Eingin kundi betur enn føroyingurin fata, hvussu sárt tað kendist at frætta, at skip søkka og manningin sjólætist.

Tað kann tí ongan í Føroyum undra, at tey donsku bløðini skrivaðu so nógv um Sally-ólukkuna.

Sjáldan hevur nøkur hending verið meira umrødd í teimum stóru Keypmannahavnar bløðunum enn henda.

At ein av manningini "bar boðini heim" hevði jú alstóran týdning. Og tað var fyrst og fremst út frá hansara frásøgnum, at bløðini skrivaðu.

Danska Social-Demokraten kundi longu 24. mai saman við tíðindunum um ólukkuna greiða frá, hvussu skipið hevði roynst, frá tí tað var bygt, og til tað fórst undir Sandoynni. Blaðið visti at siga frá, hvussu ringan túr Sally hevði havt til Føroyar hetta várið, og tað visti at siga frá ymiskum viðvíkjandi teimum sjólátnu og teimum, ið eftir sótu.

Sosialurin heldur, at tað átti at verið forboðið at siglt millum oyggjarnar uttan at hava meinkunnugar menn umborð.

## Koppaður tvær ferðir

Danska Social Demokraten skrivaði:

Sandsugeren Sally er bygget i Aalborg. Firmaet N.C. Monberg har fornylig i Anledning af Havnearbejderne paa Færøerne købt Skibet af det store Entreprenørfirma Højgaard & Schultz, der havde benyttet det ved sine Havnearbejder i Gdynia i Polen.

N.C. Monberg havde hentet Sally i Danzig, hvor det havde været paa værft. Det var blevet undergaaet en gennemgribende Reparation, men Skibet har ikke tidligere haft er særligt godt Ry paa sig.

Vi talte i Aftes med (fyrrverandi) Skipper Georg Christiansen, der udtalte:

Jeg kender Sally, og jeg skal ikke lægge skjul paa, at det var med bange Anelser, at jeg fornylig saa det sejle til Færøerne. Man skal kende det ud og ind for at sejle i det lumske Farvand deroppe. Jeg sejlede selv med Sally i 1929, og da kæntrede Skibet ud for Hou ved Aarhus. Vi blev dog alle reddet i Land, og Skaden blev senere udbedret.

Sally har før den tid tilhørt et svensk entreprenørfirma, og det kæntrede ogsaa engang ved Kullen, og en Sømand mistede Livet.

Jeg ved ikke hvordan Katastrofen ved Færøerne er indtruffen, men jeg tænker at der ikke har været last, og Sally har ligger saa højt, at Søerne har haft let Spil over for det.

## Deyður skrivaði ræðubræv heim

Blaðið hevði fingið fatur í tí síðsta brævinum, sum matrósurin Eigil Gaarslev hevur skrivað til gentu sína í Keypmannahavn. Blaðið skrivaði, at um rætturin fór at kanna eftir, um tað var forsvarligt at lata hetta skip fara til Føroya, so fór hetta bræv óivað at vera eitt týdningarmikið skjal í málinum. Vit skulu her prenta upp aftur tann partin av brævinum, sum blaðið endurgevur:

"Det var et Helvede at komme frem hertil. Skuden var utæt som en gammel Støvle. Vi havde et Helvede med at holde den flydende. I Maskinrummet stod Vandet lige op paa til Fyret, saa det var ved at gaa ud. Maskinen fik lige Damp nok til at kunde gaa med 4 Miles i Timen. Der var 8 Fod Vand i Lukafet og 5 Fod i Maskinrummet. Skibet slingrede og hoppede paa Søen som en tom Sardinkasse. Vi har næppe haft Tid til at Spise og kan ikke vaske os. Vi har maattet arbejde 18 til 20 Timer for at holde Skibet oven Vande."

Den forulykkede Sømands sidste Brev slutter med en Hilsen til hans Kæreste og til hans Familie, som han aldrig mere kom til at se. Hans Brev og den Udtalelse, der er fremkommet af den tidligere Skipper bør give anledning til at undersøge Forsvarligheden af at besejle de farlige Farvande med en øjensynligt alt andet end sødygtig Baad.

## Ein eydnurík móður

Vi kiggede i Aftes ind i de smaa Stuer, hvor fru Andersen, hvis Søn Viggo Andersen overlevede, bor.

Hun smilte venligt og sagde: "De kan tro, at jeg var lykkelig over, at min store Dreng blev reddet. Jeg vilde først ikke tro det, da jeg hørte om den forfærdelige Ulykke. Nu haaber jeg snart at se ham herhjemme igen.

Men i min Glæde over, at jeg maatte beholde min Søn, glemmer jeg ikke dem, der blev derude, og jeg har den dybeste Medfølelse med de Efterladte, der i dag har modtaget den forfærdelige Meddelelse.

## Sorgarboðini

Tað var svágurin, ið bar Gustav Monberg boðini um, at sonurin, hin 25 ára gamli Niels var druknaður. Hann var fyri stuttari tíð síðani liðugur við sína útbúgving, og var henda havnabygging í Føroyum hansara fyrsta uppgáva sum verkfrøðingur. Tá hesi arbeiði vóru liðug var ætlanin, at hann skuldi ferðast í ymsum londum at vinna sær meira kunnleika á økinum.

Tað var starvsfólkið hjá Monberg, ið mátti bera hinum familjunum sorgarboðini. Tað var syndarligt at bera hesi boð, serliga til konu skiparan. Hon sat eftur við fleiri børnum eisini undir konfirmatiónsaldur.

Tey, ið bóru boðini um Gaarslev, hittu systir hansara. Hon segði, at bæði faðirin og móðurin lógu sjúk. Tey máttu einki fáa at vita enn, tað fóru tey ikki at tola.

Vága sýslumaður bar boðini um deyða Carl Olsens til faðirin, ið stóð og skar torv. Óla Jákup tók sorgarboðini soleiðis, sum føroyingar vanliga gera. Hann segði lítið, einans drap niður høvur. Hann hevði frammanundan mist konuna.

Annars fekk Hans, beiggi Carl, eitt serligt minni. Hann var sum nevnt vinur Niels Monberg. Pápi Niels, Gustav, gav Hans eina bók, sum Niels hevði átt sum eitt minni um



Kenneth Gaarslev, sonur Eigil, hevur savnað søguna hjá pápanum, sum fekk hendan syrgiliga endan í føroyskum sjógvi. Nú kemur søgan uppá prent í Føroyum



Eigil Gaarslev var royndur sjómaður og legði ikki fingrarnar ímillum. Hann gjørdist bert 39 ár




Her sæst "rutan" frá tí, Sally fór av Havnini, og til seinasti maður endar í Kirkjubø